

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 03 - 2013

# Kina og Russland gjørt risastóran sáttmála um gass

Nú tann nývaldi kinesiski forsetin, Xi Jinping, er á almennari vitjan í Russlandi, hava hann og Vladimir Putin, forseti, skrivað undir ein sáttmála millum russiska olkurisan Gazprom og tað almenna kinesiska oljufelagið China National Petroleum Company (CNPC). Tað eru fleiri ár, síðani partarnir fóru undir samráðingarnar um tann risastóra sáttmálan, sum ber í sær, at frá 2018 skal Gazprom lata Kina í minsta lagi 38 milliardir rúmmetrar av gassi um árið. Hetta er ikki tann fyrsti sáttmálin millum Gazprom og CNPC. Í 2009 samdust partarnir um, at Gazprom skuldi lata tí kinesiska felagnum næstan 70 milliardir rúmmetrar av gassi um árið í 30 ár, men tá saman um kom, kundu partarnir ikki semjast um prísin á gassinum, og tí fór sáttmálin fyri skeyti. Russland er heimsins størsta orkuframleiðaraland, og Kina er heimsins størsti orkukeypari.